## TILTØK

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Minnismáltíð Harrans, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 framhald av møtirøðini við John í Skemmuni og Símun Pætur á Torskilsheyggi.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

**Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond**
Morgunmøti kl. 11, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 21 ungdómsmøti, í morgin kl. 17 landsbøn. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 18 kvøldmøti v/ Ólavur Jacobsen. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Fríggjadagin kl. 20 í KFUM: Opið hús fyri ung.

**Meinigheitshúsið Húsagøta 1**
Opið hús leygarkvøldið er avlýst vegna missiónsviku á Argjum.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti, Mourits Mouritsen talar og Meinigheitskórið syngur.
Mánakvøldið kl. 19 verður LU-arbeiðið, evni: Faðir vár v/ Poul Johannesen, kl. 20 venur Manskórið.

**Kirkju- og Missónshúsið á Argjum**
Fríggjadagin kl. 20 møti, talari: Sørin Steinhólm, sangur: Sangluttøka av Toftum.
Leygardagin kl. 20 møti, talari: Regin Høgnesen, sangur: Manskórið í Meinigheitshúsinum.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti, menn frá mansstevnuni luttaka.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Juliu og Eyðun Zachariasen, Ísaksgøtu 12. Øll eru vælkomin.

**Rhema á Hálsi**
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P.
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsømti. Sunnudagin kl. 17 møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Fríggjadagin kl. 21 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, Rumeniamissiónin. Mánadagin kl. 20 bønarmøti hjá Jóhan Hendrik og Eyðbjørg.

**Filadelfia, Sundalagi**
Sunnukvøldið kl. 18 møti.

**Soli Deo Gloria**
Hvønn mánadag kl. 20 bíbliutími og bønarmøti.
Hvønn hósdag kl. 20 ungdómsmøti.
Hvønn sunnudag kl. 14 sunnudagsskúli.
Leygardagin 10.2. kl. 20 møti við Torbjørn Láadal.
Sunnudagin kl. 18 møti við monnum úr Hoyvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð**
Leygardagin kl. 17.30 verður barnamøti, kl. 20 evangel. møti við luttøku úr Evangeliihúsinum.
Sunnudagin kl. 10.30 møti við Einar Jonesen og kl. 19 evangel. møti við Dánjal á Dul Jacobsen.

**Ørkin, Saltangará**
Møti verður sunnudagin kl. 17 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará. Húsmøti verður hjá Trúgva og Maybritt Berg týsdagin kl. 19.00. Verið hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Í samband við Skálaleguna, sum byrjar í Nesvík leygarmorgunin kl. 9.30 verða eingi tiltøk í Meinigheitshúsinum leygardagin og sunnudagin. Familjumøti verður í Nesvík sunnudagin kl. 14 har øll eru hjartaliga vælkomin at vera við.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús við Símun Absalonsen. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti við Jastrid og Paula Høj, kl. 17 møti við húsbólki. Kl. 17 barnamøti. Tú ert vælkomin í Kelduna.

**Betesda, Klaksvík**
Fundarøðin heldur fram hvørt kvøld hesa vikuna. Í kvøld kl. 20 tala Poul Johan Djurhuus og Hjørleif Vang. Evni: »Jesus í heiminum«.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður í missiónshúsinum á Tvøroyri fríggjakvøldið 9. februar kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow, Suðuroy**
Fundur verður leygardagin kl. 17 í hølunum hjá Tvøroyrar Handverkarafelag. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Týsdagin kl. 20 ungdómsfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti v/ Toril og Niels Edvard Olsen.
Mánakvøldið kl. 20 heimaforbundið.

**Sandvík/Frelsunarherurin í Vági**
Møti verða í Ranhøll í Sandvík fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 5.2.*
Seyma fýrkantar saman til teppir til móður Theresufelagsskapin
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilm. til døgurðan og túrin mikudagin, tlf. 316491
*Týsdagin 6.2.*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Hvør kennir? Gamlar myndir frá myndasavninum í Hoyvík
*Mikudagin 7.2.*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði (tilm. mánadag tlf. 316491)
kl. 14.30 Framsýning. Passiutónar. Trúarlig tema í norðurlendskari list. Listasavn Føroya
*Hósdagin 8.2.*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát um skanning, brenning, printing og nýtslu av alnótini verður á 1. hædd, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 9.2.*
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Felagið Tórshavn gongutúrur**
Sunnudagin 11. februar verður lættur gongutúrur eftir gøtum í Hoyvíkshaga: Inni á Gøtu – Niðarahjalli – Ternuryggur. Byrjað verður Inni á Gøtu kl. 14.30 (býbussur leið 3 fer úr Steinatúni kl. 14.18). Havið heit og góð gonguklæði og ein heitan drekkamunn við. Tilmelding.

**Vágs Matmøðrafelag**
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundur verður í kvøld kl. 20-21.

**Al-anon**
fundur er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 á Vaskarínum í Tórsgøtu 5.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn**
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14 til 20 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið svarar alt samdøgrið**
á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International**
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

**Føroyskir fiskimenn**
uttanlands, tlf. 21 04 95. Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**MBF-skrivstovan**
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail: mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373.

**Javni N. Finsensgøta 32**
Skrivstovan er stongd vegna flyting. Samband fæst við felagið við at ringja tlf. 314827 og 224589, fax: 310557.
e-mail: javni@post.olivant.fo

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
MBF Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 fax 310813
e-mail: gikt@post.olivant.fo
Opið týsdag og hósdag kl. 10-13.
Fibromyalgibólkurin: Telefonviðtala týsdag frá kl. 10-12.
Foreldrabólkurin at giktsjúkum børnum: Betty og Noel Joensen, Klaksvík, tlf. 457337 eftir arbeiðstíð.
Ungdómsbólkurin: Sára Tummassardóttir, tlf. 373106 eftir skúlatíð.
E-mail: sara@post.olivant.fo

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419
Skrivstovan er á niðaru hædd og er opin hesar tíðir.
Týsdag fyrrapart kl. 10.00-11.30
Hósdagin seinnapart kl. 16.00-17.30.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Sjómansheimið Ørkin í Reykjavík**
Møtini byrjaðu 1. oktober kl. 16 og verða hesa klokkutíð allan veturin.

**Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«**
er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

**Evangeliska Røddin**
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Føroyska nærvarpið í Esbjerg**
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11 og verður endursend kl. 16.

**Føroyskt møti í Ålborg**
Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroyskt møti í Århus**
Leygarkvøldið 10.2. kl. 19.30 møti v/ Jóhan Hansen, trúboðara, Horsens. Møti verður í Missiónshúsinum Carmel, Klosterport 6, 8000 Århus C. (Nýtið hurðina, sum liggur á horninum Klosterport-Nørre Allé). Eftir møti verður bjóða kaffi o.a. Høvið verður at geva eina peningagávu til útreiðslurnar av arbeiðinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroyskt barnamøti**
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 60 ÁR

Birgit av Lofti verður 60 ár mikudagin 14. februar. Dagurin verður hildin í Ebenezer. Samveran byrjar kl. 19 við eini sangløtu, har sangkórið syngur og Svenning av Lofti geriður frá um sangir. Síðani verður ein sjálvtøkumáltíð.



## FILMSTEIGURIN

# Kejserens nye flip

Tað er eitt álvarsligt bakkast fyri Kuzco keisara, tá óndi ráðgevi hansara, Yzma, gera keisaran um til eina lama – altso eina slíka við pelsi og fýra beinum. Pacha bóndi, hvørs bygd, Kuzco júst hevur hótt við at leggja í oyði fyri at byggja sær eina nýggja summarborg, Kuzcotopia, er einasta bjarging hansara. Men hóast Pacha er ein fittur maður, so hevur hjálp hansara sín prís. Kuzco játtar at sleppa ætlanunum um summarslottið sum løn fyri hjálp Pacha – tí ein lítil neyðlygn hevur ongan týdning fyri Kuzco!

Eftir nøkrum innleiðandi kegl enda teir tó sum viðspælarar á vandafullu, men eisini komisku ferð aftur til slottið hjá Kuzco, har tann ,únski Yzma hevur tikið valdið. Hennara upprunaliga ætlan var at drepa Kuzco, men tápuligi hjálpari hennara, Kronk; klutraði í tí, og tí er Kuzco nú á veg aftur til slottið fyri at endurvinna trúnina. Tað er Yzma als ikki glað fyri, so nú byrjar stríðið.

Við eitt sindur av hepni kann Kuzco framvegis náa at fáa fatur á mannaeliksir hjá Yzma, sum kann gera Kuzco til menniskja aftur – nå ja, í øllum førum til keisara. Tað við tí menniskjaliga knípur tað eitt sindur við. Men kanska verður hann klókari sum menniskja av at vera ein lama…

Walt Disney Pictures presenterar »Kejserens nye flip« – eitt spennandi ævintýr um tað mest ómakaða parið, sum nakrantíð hevur fjasað runt í Andesfjøllunum…






# Forheksaður

Hvat gert tú, tá djevulin leitar eftir tær, í skapi av eini vakrari babe, og hon bjóðar, at tú kanst fáa heili sjey ynski uppfylt? Og tað einasta, hon skal hava afturfyri, er hetta løgna, ið verður kallað sál?

Tað er júst tað, sum hendir fyri Elliot Richards (Brendan Fraser) í hesi nýggju komediuni hjá Harold Ramis.

Neyðars Elliot arbeiðir sum online-support-ráðgevi í einum stórum teldufelag, og hann er hjartagóður, men total uttan situatiónfornemmilsi og komplet kiksaður í royndum sínum at vinna tokka millum fólk. Elliot er hugtikin av sínum kvinnuliga starvsfelaga, Alison Gardner (Frances O'Connor), men tíverri veit hon nóg væl, at hann er til.

Og her er tað so, at devulin kemur inn í myndina og til høvið hevur tikið skapi eini yvirdádigt lekkrari kvinnu (Elizabeth Hurley). Sjey ynski vil hon geva honum aftur fyri sálina. Elliot er ikki seinur at taka av, og harvið fer spælið í gongd. Tí devulin er ikki seriga óndur; hinvegin argar hon illa. Tá Elliot ynskir sær at gerast ríkur, stórur og giftur við Alison, so gongur ynskið kortini út. Men so vísir tað seg, at Alison er honum ótrúgv, og at hann sjólvur er ein colomianskur nakrohávur. Og so framvegis, ynski eftir ynski – til bert eitt er eftir, og Elliot er tvungin til at hugsa seg væl um, áðrenn hann setur ynskið fram…





Frumsýning
Fríggjadagin 09.02. kl. $21^{00}$ Fríggjadagin 09.02. kl. $23^{15}$
Leygardagin 10.02. kl. $21^{00}$ Leygardagin 10.02. kl. $23^{15}$
Sunnudagin 11.02. kl. $20^{00}$ Sunnudagin 11.02. kl. $22^{15}$

www.in.fo/havnarbio

HAVNAR BIO
Tlf. 311956




Frumsýning
Fríggjadagin 09.02. kl. $17^{00}$
Leygardagin 10.02. kl. $17^{00}$
Sunnudagin 11.02. kl. $16^{00}$

Billettprísur: 45,- kr.
Fríggjadagin 09.02. kl. $19^{00}$
Leygardagin 10.02. kl. $19^{00}$
Sunnudagin 11.02. kl. $18^{00}$




Fríggjadagin 09.02. kl. $22^{30}$ Leygardagin 10.02. kl. $22^{30}$
Sunnudagin 11.02. kl. $21^{30}$




Fríggjadagin 09.02. kl. $18^{00}$ Leygardagin 10.02. kl. $18^{00}$
Sunnudagin 11.02. kl. $17^{00}$




Fríggjadagin 09.02. kl. $20^{00}$ Leygardagin 10.02. kl. $20^{00}$
Sunnudagin 11.02. kl. $19^{00}$